

# Oljuprísurin hækkar hóast fullar goymslur

Jógvan Hugo Gardar

11.09.2015 - 10:45

Oljan.fo

Um mánavarskifti fór oljuprísurin bráddliga at hækka, og nærkaðist 55 dollarum fyri fatið av Norðsjóvarljuni Brent. Síðani hevur hann lækka nakað, men hesa vikuna hevur prísurin sveiggja millum 48 og 49 dollarar fyri fatið.

Í gjár komu fesk tøl úr USA sum vístu at oljugoymslurnar framvegis eru á tremur. Vanliga skumpar hetta oljuprísin niður, men so hendi ikki í gjár, í staðin kbvinkavi prísurin upp. Fyrr í morgun lá prísurin um 48,75 dollarar fyri fatið, og í løtuni er hann komin uppá 48,90 dollarar. Amerikanska lættoljan er eisini hækkað eitt vet, og kostar nú 45,64 dollarar fyri fatið.

Sambært E24 vísa amerikanskir miðlar á at bensingoymslurnar ikki eru líka fullar sum mett varð frammanundan, og at tað ger at oljuprísurin hækkar nú.